# Sveinaroyndin hjá samgonguni

**Eit nýtt samgonguskjal, har búskaparligi málsetingurin er at yvirkskotið skal vaksa á hvørjum ári, umframt at nakrar fáar íløgur, sum longu eru í gongd, fara avstað við stórum parti av íløgukarminum. Hesar eru fortreytirnar til fíggjarlógina næsta ár. – Tað er ein spurningur um at raðfesta, og vit mugu gera okkum greitt, at av somu orsøk verða fleiri aðrar smærri íløgur raðfestar lægri, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður. Stutta skotbráið til fíggjarlógararbeiðið, orsakað løgtingsvalið og skipan av nýggari samgongu, fer at merkja viðgerðina í Løgtinginum, sum helst verður truplari enn undanfarin ár, væntar løgmaður.**


*Løgmaður metir ikki, at hetta fíggjarlógaruppskotið er so nógv merkt av, at ein nýggj samgonga er skipað*

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Mánadagin verður uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár lagt fram. Eftir av fíggjarmálaráðharrin í eina tíð hevur roynt at fáa kabalina at ganga upp, hava teir fýra samgonguflokkarnir nú formliga góðkent fíggjarlógaruppskotið, sum er tað fyrsta hjá hesi samgonguni, ið sá dagsins ljós 6.juni.

At løgtingsval var í vár og ein nýggj samgonga er skipað við einum nýggjum samgonguskjali sum grundarsteini undir sínum arbeiði, fer at merkja fíggjarlógina, og kanska serliga fíggjarlógarviðgerðina, metir Anfinn Kallsberg, løgmaður. Drúgvu samráðingarnar um at skipa nýggja samgongu gjørdu, at fíggjarlógararbeiði byrjaði ikki fyrr enn einaferð í juni. Sjálvt um landsstýrismaðurin í fíggjarmálum setti 5.august sum evstamark fyri, nær landsstýrismenninir skulu koma við teirra tølum og ynskjum, so komu síðstu tølini ikki fyrr enn beint áðrenn fíggjarlógaruppskotið skuldi til prentingar, og tað er sera óheppið og als ikki nøktandi, metir Anfinn Kallsberg.

- Av tí at skotbráið hevur verið so stutt, kunnu vit vænta, at partar av tí viðgerðini, sum átti at farið fram innanhýsis í samgonguni, áðrenn fíggjarlógaruppskotið fór niðan í Tingið, nú í staðin fer fram í løgtinginum og millum viðgerðirnar, vísir løgmaður á. Samgongan er í høvuðsheitum samd um fíggjarlógaruppskotið, men tað slepst helst ikki undan, at nakrar broytingar verða gjørdar, leggur hann afturat.

### Byggir á herðarnar

Løgmaður metir annars ikki, at hetta fíggjarlógaruppskotið er so nógv merkt av, at ein nýggj samgonga er skipað.

- Ein fíggjarlóg vil altíð byggja á ta undanfarnu, og í fíggjarlógini fyri 2003 eru harumframt nógvar bindingar, sum ger "rásarúmið", har pláss er til broytingar, trongt. Á íløgusíðuni hevur undanfarna samgonga bundið seg til fleiri stórar íløgur, t.d. Suðuroyarskipið, samferðsluhavn í Suðuroynni og játtanir til Vágatunnilin og Norðoyatunnilin. Her er talan um stórar íløgur, sum avmarka møguleikarnar hjá samgonguni, og sum gera, at neyðugt verður at raðfesta aðrar íløgur lægri, vísir løgmaður á. Tí verður ikki pláss til nógv av ynskjunum, sum landsstýrismenninir hvør í sínum lagi kundu hugsað sær at fingið framt í verki. Løgmaður vil tó ikki siga, hvørt krøvini frá landsstýrisfólkunum, harav fleiri eru nýggj, eru størri í ár enn undanfarin ár. Eisini tá verður havt í huga, at árið í ár hevur verið merkt av einum langum valstríði, og einum løgtingsvali.

- Krøvini eru altíð stór til eina fíggjarlóg, serliga í uppgangandi tíðum. Tað er greitt, at nógv liggur framvegis á láni síðan kreppuárini fyrst í nítiárunum, og síðan tað fór at ganga betri í samfelagnum, hevur verið trýst á fyri at fáa ymiskt gjørt, t.d. vegir og havnir, skúlar, heilsuverk, eldraøkið osv. Men vit mugu hava í huga, at tað ber ikki til at gera alt í senn. Tað er aftur ein spurningur um at raðfesta. Harumframt má ansast eftir, at tað almenna ikki tekur alla arbeiðsorkuna í landinum, sigur løgmaður og vísir á, at longu í dag eru fleiri fløskuhálsar, t.d. í byggivinnuni, har trupult er at fáa fólk at gera ymisk arbeiði.

- Undanfarna samgonga setti sær fyri at fáa gjørt nakrar stórar íløgur, sum vit mettu vóru neyðugar. Til dømis verða nýggja Suðuroyarskipið og samferðsluhavnin í Suðuroynni tungir postar á fíggjarlógini, bæði næsta ár og í 2004. Men tá eru íløgurnar eisini goldnar, og pláss verður aftur til aðrar íløgur, vísir løgmaður á.

### Yvirskot og skattalætti

Løgmaður kann bara staðfesta orðini hjá Karsteni Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um at fíggjarlógin fyri 2003 fer at geva yvirskot. Hann vísir á, at í samgonguskjalinum hava flokkarnir í samgonguni bundið seg til, at munurin millum inntøkur og útreiðslur skal vaksa positivt á hvørjum ári, tvs. at budgetteraða yvirskotið skal vaksa á hvørjum ári. Og henda málsetning livir fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 upp til, sigur Anfinn Kallsberg.

Ein annar av yvirordnaðu málsetningunum í samgonguskjalinum er, at skatturin skal lækka. Og skatturin fer at lækka næsta ár, lovar løgmaður. Men í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár er hædd ikki tikin fyri skattalættanum.

- Tað er vanligt, at fíggjarlógaruppskotið verður snikkað til eftir teimum fortreytum, sum eru galdandi, tá uppskotið verður gjørt. Skal skatturin lækka, so er neyðugt við lógarbroytingum, og arbeitt verður í løtuni við at fáa hesar framdar, sigur Anfinn Kallsberg. Hann vísir á, at skattalættin verður roknaður inn í fíggjarlógina millum viðgerðirnar í løgtinginum í heyst, og verður klárur, tá fíggjarlógin skal samtykkjast einaferð í desember.

Anfinn Kallsberg vil ikki gera viðmerkingar til, at fíggjarlógin næsta ár hækkar, møguliga við eini 100-150 milliónum krónum. Men greitt er, at stóru lønarhækkingarnar fara at síggjast aftur á fíggjarlógini. Anfinn Kallsberg vísir á, at samgongan hevur sett sær fyri at fáa skattin niður, heldur enn lønirnar upp, næstu árini. Men tað skal gerast í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, leggur hann afturat.

- Tað er bara ein vinnari, tá talan er um lønarhækkingar. Tað er ikki løntakarin, tað er ikki vinnan, men tað eru teir almennu kassarnir. Tí við lønarhækkingum gerast tað fleiri sum koma at gjalda høga marginalskattin, og tað gevur fleiri krónur í landskassan og kommunukassarnar. Harafturímóti merkir borgarin lítið og einki til sína lønarhækkan, samtíðis sum kappingarførið hjá vinnuni versnar. Tí er rættari at fáa skattin niður, vísir løgmaður á.

### Eldraøkið raðfestast

Anfinn Kallsberg metir, at tann parturin av málsetningunum í samgonguskjalinum, sum sæst best aftur í fíggjarlógaruppskotinum, er eldraøkið.

- Í valstríðnum vóru allir flokkar samdir um, at tørvurin er stórur á eldraøkinum, og tað er eisini felt niður í samgonguskjalið, at nakað skal gerast við økið. So um eg skal taka nakað ávíst burturúr, so má tað vera eldraøkið, sum samgongan hevur valt at raðfesta høgt næsta ár, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

# Tríggir Kingomenn og Eivør

**Í Mentunarhúsinum í Fuglafirði ber til at hoyra 12 ymiskar útsetingar kingosálmi**

KONSERT
*Eirikur Lindenskov*

Í morgin, sunnudagin, kl 20 hava »Teir tríggir kingomenninir og Eivør« konsert í Mentunarhúsinum í Fuglafirði.

Teir tríggir kingomenninir eru Hans J. Hansen, Petur J. Eliassen og Niels Midjord, og tað sermerkta við teirra framførslu hesaferð er, at teir hava bert ein sálm á skránni, nevniliga morgunsálmin »Jeg står nu op i Herrens navn« eftir norska prestinum, Samuel Olsen Bruun.

Fýra tey síðstu versini av hesum sálminum vóru nógv nýtt í Føroyum sum sjósálmur, tað finnast heili 18 ymiskar upptekningar frá átta ymiskum bygdum, og eru hesi løgini ógvuliga ymisk, bæði í dámi, rútmu og longd.

Kingomenninir syngja 12 av hesum løgunum, so á konsertini fæst hylling á, hvussu fjølbroyttur kongosangurin í Føroyum veruliga var.

Eivør er Eivør Pálsdóttir, og henni nýtist kanska ikki serliga umtalu, soleiðis sum hon hevur gjørt vart við seg bæði sum forsangari hjá Prix Føroyar vinnaranum, Clickhaze, við bólki sínum Ivory og sum kingosangari.

Á konsertini fer Eivør at syngja egin løg við gittarfylgispæli, eisini fara øll fýra at syngja saman.

Úr Tjørnuvík eru seks upptekningar av áður nevnda sálmi. Fyri at geva eina hylling av, hvussu sálmasangurin í Tjørnuvíkar kirkju kann hava ljóðað, syngja øll fýra millum annað hvør sína av hesum upptekningumsaman og samstundis.





Narkomálið:

# Trý ára fongsulsrevsing

**Tann nógv umrøddi bakmaðurin í stóra narkomálinum varð av Eystara landsrætti dømdur 3 ára fongsulsrevsing. Dómurin í Føroya rætti varð í høvuðsheitum staðfestur, men smá frávik vórðu gjørd í mongdunum. Talan er um harðastu revsingina av sínum slag í Føroyum**


*Dorthe Møller Andersen, ákæri, letur væl at dóminum hjá Eystara landsrætti*

NARKOMÀLIÐ
*Heri á Rógvi*

Kl. 8. 45 fríggjamorgunin kunngjørdu teir tríggir landsrættardómararnir, Knud Knudsen, Kaspar Linkis og Sanne Kolmos, dómin fyri tann 36 ára gamla, ið verður mettur av vera tann høvuðsákærdi í tí stóra narkomálinm. Dómurin gjørdist 3 ár. Hetta eru tveir mánaðir meira enn tann 36 ára gamli fekk í Føroya rætti. Revsingin liggur millum krøvini frá verjanum og ákæranum, sum kravdu ávíkavíst 20 mánaðir 45 mánaðir.

Tað var tann 36 ára gamli, ið valdi kæra dómin fyri Eystara landsrætti. Síðani hevur ákæruvaldið aftur kært til Eystara landsrætt fyri nøkur punkt í dóminum í Føroya rætti. Sjálv ákæran, ið dómurin frá Føroya rætti er grundaður á, er í 33 punktum. Tað vóru tó ikki øll punktini, ið vórðu kærd til landsrættin. Tann 36 ára gamli kravdi frídøming í nøkrum punktum, og hann kravdi í fleiri førum linari revsing. í flestu førum staðfesti Eystari landsrættur dómin hjá Føroya rætti. Mongdir eru tó eitt sindur størri, og hetta hevur mestur merkt dómin, soleiðis at talan gjørdist um økta revsing.

Munurin á báðum dómunum eru mongdirnar. Í Føroya rætti varð dømt fyri innsmugling av 2 kg av hassji, harumframt sølu av 10,74 kg afturat, viðvirkan til innsmugling av 54 kokain og sølu av 60 g og sølu av 25 g amfetamin og roynd at útvega sær 10 g harafturat.

Í dóminum frá Eystara landsrætti stendur soleiðis at lesa:

»Mongdin av euforiserende (dusandi) evnum, sum tann ákærdi er dømdur eftir, eru umleið 14 kg av hassj, umleið 133 g av kokain og 55 g amfetamin.«

Bæði í Føroya rætti og í landsrættinum varð dentur lagdur á, at somu mongdir kunnu koma fyri í fleiri førum.

Samanumtikið ber til at siga, at Eystari landsrættur hevur í sínum dómi tikið munandi størri nøgdir við. Talan kann eisini vera um ymsar samaleggingar.

Í tílíkum málum verður harðasti straffurin vanliga givin fyri innsmugling.

Tann 36 ára gamli skal gjalda 550.000 kr. fyri sína inntøku av rúsevnasøluni. Hetta tal var 650.000 í Føroya rætti. Í dóminum frá Eystara landsrætti stendur at lesa, at ein stór óvissa valdar um prís, og tí verður ein mett upphædd løgd hald á.

Afturat teimu 550.000 túsund krónum skyldar tann 36 ára gamli sakarmálskostnaðin fyri bæði rættargongdina í Føroya rætti og Eystara landsrætti. í Føroya rætti gjørdist kostnaðurin fyri rættarmálið 140.000 kr., umframt Mvg.

Tað hevur tó ikki eydnast løgreglu ella ákæruvaldið at funnið nakrar pengar hjá tí 36 ára gamla. Tað verður sostatt staturin, sum kemur at gjalda kostnaðin fyri tann 36 ára gamla, til hann aftur fær fatur á peningi ella løgreglan finnur pening hjá honum.

Hin 36 ára gamli fer væntandi til Danmarkar at sita. Umstøður eru ikki til at sita so leingi í Føroyum, og tí fer tann 36 ára gamli mest sannlíkt til Danmarkar. Hann verður verandi varðhaldsfongslaður til sjálv revsingin byrjar. Hann hevur sitið varðhaldsfongslaður síðani 17. januar í ár. Frá 17, januar til 25. apríl hevur hann sitið avbyrgdir (isolatiónsfongslaður). Hetta kemur mest sannlíkt honum til góðar, tí revsingin í Danmark verður niðursett við einum degi fyri hvørjar tríggar, ið ein situr varðhaldsfongslaður. Tað merkirs sostatt, at tann 36 ára gamli sleppur undan umleið einum mánaði handan rimar.

### Savnandi leiklut

Ein munur á dóminum í Føroya rætti og honum í Eystara landrætti er tann, at Eystari landsrættur gevur ákæruvaldinum viðhald í, at tann 36 ára gamli hevur spælt ein stóran og miðsavnandi leiklut í smuglingini og søluni av rúsevnum í Føroyum.

Soljóðandi stendur at lesa í dóminum:

»Der lægges ved strafudmålingen tillige vægt på sagens omfattende karakter, både i tidsmæssige udstrækning og med hensyn til mængden af euforiserende stoffer. Fer lægges endvidere vægt på, at det efter bevisførelsen, herunder de foretagne aflytninger, kan lægges til grund, at tiltalte har indtaget en meget central og overordnet rolle både med hensyn til at skaffe stofferne til Færøerne og med hensyn til distribution og videresalg til Færøerne.«

### Væl nøgd

Dorthe Møller Andersen, ið hevur verið ákæri í málinum, sigur, at hon er væl nøgd við dómin. Hon sigur, at arbeiðið hevur verið sera umfatandi, og hetta hevur kravt nógva tíð og orku frá ákærumyndugleikanum og løgregluni.

Málið er nógv tað størsta málið av sínum slag í Føroyum. Enn eru persónar eftir, sum skulu fyri rættin í sambandi við stóra atsóknina móti rúsevnamarknaðinum í Føroyum, ið løgreglan gjørdi alment kenda í januar eftir drúgvar og umfatandi kanningar.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá tí 36 ára gamla manninum.


*Tann høvuðsákærdi í narkomálinum varð dømdur 3 ára fongsulsrevsing fyri samskipan, sølu og viðvirkan til smugling av rúsevnum. Hann fær mestur eitt ára rabat fyri tíðina, hann var arbyrgdur*

## Siðsemisnevndin havt fyrsta fundin


*Siðsemisnevndin hevði sín fyrsta fund eftir umskipanina hósdagin. Formaðurin í nevndini verður tann sami sum áður.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Nógv umrødda Vísinda siðsemisnevndin hevur nú havt sín fyrsta fund. Greitt er, at Høgni Djurhuus heldur fram sum formaður**

SIÐSEMISNEVNDIN
*Heri á Rógvi*

Vísinda Siðsemisnevndin hevði hósdagin sín fyrsta fund. Teir sjey limirnir hittust fyri fyrstu ferð síðani nevndin varð skipað av nýggjum. Á fyrsta fundinum skipaði nevndin seg við Høgna Djurhuus sum formanni. Tað er sostatt verandi formaður, ið heldur fram í sessinum.

Siðsemisnevndin hevur rættiliga verið í andglettinum, síðani Bill Justinussen sum nýggjur landsstýrismaður valdi nýggj umboð í nevndina. Nevndarvalið hevur verið á ovasta politiska stigið og vent, tí ivi er sáddur um tey fólk, ið Bill Justinussen hevur valt í nevndini. Eisini á tingi hava atfinningarnar verið nógvar móti teimum, ið Bill Justinussen hevur valt í nevndina.

Tað er Læknafelagið og landsstýrismaðurin í heilsumálum, ið velja limirnar í nevndina.

Teir tríggir nevndarlimirnir, sum Læknafelagið valdi í nevndina, eru Høgni Djurhuus, Annika Olsen og Eliesar Olsen, sum øll eru læknar.

Hinir fýra nevndarlimirnir eru:

Anne-Lene Olofson, lektari úr Klaksvík, Eydna Háberg, sjúkrasystir úr Havn, Dánjal á Dul Jacobsen, fyristøðumaður úr Havn og Jens Vang, løgfrøðingur úr Havn.